**Kristin Michelsen**
**Magnus Rasmussen**
**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
**Edmund Joensen**
**løgtingsmenn**

**Broytingaruppskot**

**til**

**3. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 98/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)** (Leingjan av rættinum til barsilspening við tveimum vikum, harav onnur er markað til pápan)

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** Fráðgreiðandi heitið verður orðað soleiðis:
"(Leingjan av rættinum til barsilspening við tveimum vikum)"
**2.** § 1, nr. 1 verður strikað.
**3.** § 1, nr. 2 verður strikað.
**4.** § 1, nr. 3 (sum verður nr. 1) verður orðað soleiðis:
"**1.** Í § 2, stk. 3, 2. pkt. verður "52-56 vikurnar" broytt til: "56 vikurnar"."
**5.** Í §1, nr. 4 (sum verður nr. 2) verður "43 vikur" broytt til: "44 vikur"
**6.** Í § 1, nr. 5 (sum verður nr. 3) verður "29 vikur" broytt til: "30 vikur"
**7.** § 1, nr. 6 (sum verður nr. 4) verður orðað soleiðis:
"**4.** Í § 9, stk. 3 verður "46 vikurnar" broytt til: "52 vikurnar"."
§ 1, nr. 7 verður hereftir § 1, nr. 5
**8.** Í § 1, nr. 8 (sum verður nr. 6) verður "29 vikunum" broytt til "30 vikunum".
§ 1, nr. 9 verður hereftir § 1, nr. 7.
**9.** § 1, nr. 10 (sum verður nr. 8) verður orðað soleiðis:
"**8.** Í § 10, stk. 3, 2. pkt. verður "46-50 vikurnar" broytt til: "56 vikurnar"."

**Viðmerkingar:**
Rætturin til barsilsfarloyvi og barsilspening verður longdur við tveimum vikum, frá 46 til 48 vikur. Við hesum broytingum kunnu foreldrini avtala sínámillum, hvør av teimum brúkar vikurnar.

**Á Løgtingi, 1. mai 2019**

Kristin Michelsen    Magnus Rasmussen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur    Edmund Joensen